# Lærara ikki til reiðar

**– Veruleikin er, at lærarar hvørki eru til reiðar ella hava orku til at gera nakað munagott við áhaldandi happing í flokkinum, staðfestu Anna Dalsgaard og Rigmor Dam, lærarar, á fundinum um happing í Miðlahúsinum mánakvøldið**

HAPPING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Sum er, at tað upp til tann einstaka læraran at ger nakað við happing í flokkinum. Ger hann tað av sínum eintingum, eru børnini heppin. Ger hann tað ikki, mugu tey bara vóna tað besta.

At duga at handfara happing er nevniliga hvørki ein liður í læraraútbúgvingini ella eitt krav til starvið sum lærari. At summir lærarar gera tað kortini, er sjálvandi at frøast um, men ikki nakað, vit eiga at taka sum eina sjálvfylgju.

Sambært Onnu Dalsgaard og Rigmor Dam, lærarum, verða teir lærarar, sum av sínum eintingum royna at seta happing á skránna, noyddir at trilva seg fram í blindum. Ongar fastlagdar mannagongdir eru stungnar út í kortið frá Mentamálaráðnum, eins og tímatalið heldur ikki leggur upp fyri tíðini, ið er neyðug at brúka. Undir slíkum umstøðum verður orkan hjá sjálvt tí mest eldhugaða læraranum skjótt uppi, og so mugu børn og foreldur bara vóna tað besta.

### Ikki upp til lærarar

Fyri at fáa eina mynd av, hvat verður gjørt við happing á teimum einstøku skúlunum, ringdi Anna Dalsgaard herfyri til lærarastovur kring landið. Tankin var, at tann lærararin, sum av tilvild tók hornið, varð eisini tann, sum bleiv spurdur. Eftir at hava spurt á eini átta størri og minni skúlum, var myndin á leið tann sama: lærarar royna hvør í sínum lagi at taka hond um happingartrupulleikar, men ána í grundini ikki, hvussu teir skulu gera. Niðurstøðan var, at sum er, er tað upp til tann einstaka læraran, um nakað verður gjørt við happingartrupulleikan ella ikki - nakað, ið sambært Onnu Dalsgaard als ikki kann góðtakast.

Anna og Rigmor undrast á, hví ongin beinleiðis happingartilbúgving er, eins og flestu skúlar til dømis fingu í samband við átakið »Børn og sorg«. Sum er, hava stigini til at gera nakað borið brá av at vera hissini royndir, sum ikki verða fylgdar upp, tí ongin veit hvussu. Ongin politikkur er á økinum, tilvildin ræður, og hvørki børn ella foreldur hava nakra trygd fyri, at happing ikki kemur at oyðileggja skúlaárini hjá tí einstaka barninum.

Ì hesum viðfangi greiddi ein mamma, sum var millum áhoyrarnar frá, hvussu trist tað var at kenna maktaloysi hjá lærararnum, tá hon royndi at fáa happaðu dóttrini hjálp. Eftir fleiri royndir var tað heilt av tilvild, at hon til endan fekk orðið á eina heilsusystur, sum bæði dugdi og hevði orku at gera nakað. Hesin næmingurin gjørdist ein av teimum hepnu, meðan tey minni hepnu framvegis verða við sviðið soð.



*Eini 120 fólk vóru savnað í Miðlahúsinum mánakvøldið, tá Sinnisbati hevði sett happing á skránna*



*Tað kann ikki verða rætt, at tað er upp til tann einstaka læraran, um nakað verður gjørt við ein happingartrupulleika í flokkinum. Men tíverri er tað veruleikin í dag, staðfesti Anna Dalsgaard, lærari*

# Myturnar halda happing við líka

**Myturnar um happing stórtrívast. Serliga treiskar eru myturnar, sum vilja lítilsgera happing og harvið eru við til at halda happingina við líka og skúgva ábyrgdina til viks, segði Rigmor Dam, lærari, millum annað í fyrilestri um happing mánakvøldið**

HAPPING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Sum flestu av hinum røðarnum í Miðlahúsinum mánakvøldið ásannaði Rigmor Dam, at happing er eitt vítt hugtak. Ofta er ringt at vita, hvar markið millum arging og happing gongur, ella í hvønn mun happing er at meta sum ein verulig konflikt ella ikki. Í hesum marknalandinum hava myturnar lyndi til at stórtrívast, og okkurt bendir á, at myturnar um happing eru serliga seiglívaðar.



*Rigmor Dam, lærari, avlívaði nakrar av teimum mest seiglívaðu mytunum um happing í sínum fyrilestri*

### Avlívaði myturnar

Ì fyrilestrinum vísti Rigmor til ástøðið hjá Dan Ulveus, har tær mest vanligu myturnar um happing verða settar upp móti fakta á ein hátt, so sjálvt teir mest seiglívaðu "sannleikarnir" um happing verða avlívaðir. Sambært Ulveus er tað til dømis onki sum bendir á, at ein happari er ein, sum hevur so lágt sjálvsvirði, at hann mest sum er noyddur at happa onnur. Oftast vísir tað seg, at happarin hevur stórt sjálvsálit, als ikki megnar at liva seg inn í kenslurnar hjá øðrum og beinleiðis trívist væl við harðskapi.

Ein onnur vanlig myta er, at "Offrið sjálvt hevur skyldina". Og Rigmor sjálv ásannaði, at í summum førum hava børn ein slíkan atburð, at tú tekur teg í at skilja, hví tey verða happað og hildin uttanfyri. Í hesum førum er tað mest sannlíkt, at tað er happingin sjálv, sum er orsøkin til, at barnið er vorðið ótolandi fyri hini børnini. Um eitt barn áhaldandi fær at at vita, at tað er býtt og drøjt, er tað ikki so løgið, um tað fer at uppføra seg í tráð við negativu væntaninar.

### Ábyrgdin skúgvað til viks

Rigmor vísti á, at við hesum eins og við mytum sum, at "Soleiðis eru børn" ella "Hatta man fara at ganga yvir", er tað mest sum undirforstaðið, at slíkt skulu tey vaksnu ikki blanda seg uppí. Gamaní eru tað støður, har børn klandrast ella arga hvønn annan, uttan at talan nýtist at vera um happing. Men um barnið áhaldandi er fyri ágangi og útihýsan er ikki talan um arging ella klandur longur, men um sálarliga niðurbrótandi happing.

Álvarsliga avleiðingin av, at myturnar fáa loyvi at standa ósvaraðar, er, at ongin vil kennist við ábyrgdina fyri at gera nakað við trupulleikan. Og júst hetta kann verða freistandi hjá einum lærara, sum frammanundan kennir tað svárt at viðurkenna, at happing veruliga er ein trupulleiki í flokkinum, hjá einum vónbrotnum foreldri ella einum skúlamyndugleika, sum velur at raðfesta øðrvísi.

Tora vit hinvegin at taka neyðuga stigið og hyggja afturum myturnar, er tað ikki longur ein spurningur, um vit skulu blanda okkum ella ikki. Tá er tað okkara skylda sum vaksin at gera tað. Og ikki minst hjá evsta skúlamyndugleikanum at krevja at happing á ongan hátt verður góðtikin, segði Rigmor Dam.

# Stórur áhugi fyri happing

**Miðlahúsið var stúgvandi fult av fólki, tá Sinnisbati hevði sett happing á skránna mánakvøldið. Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata, fegnaðist um stóra áhugan og fer nú at taka stig til, at tiltakið verur fylgt upp, so ítøkilig úrslit kunnu spyrjast burturúr**



*Stóri áhugin fyri tiltakinum um happing styrkti bara fatanina hjá Sinnisbata av, hvussu umfatandi trupulleikin við happing er í Føroyum, sigur Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata*

HAPPING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fólk úr øllum fakbólkum umframt hópin av øðrum áhugaðum vóru møtt í Miðlahúsinum mánakvøldið, tá Sinnisbati hevði valt at varpa ljós á happing í sambandi við at 10. oktober var Alheimsdagur fyri Sálarheilsu.

### Fyrilestrar og kjak

Eftir eina røð av áhugaverdum fyrilestrum, sum viðgjørdu happing út frá ymsum sjónarhornum, vóru spurningar og kjak á skránni. Breið semja tóktiskt vera um, at happing átti at verið bannað við lóg eins, og tað til dømis er í Svøríki.

Víst varð á, at tað er ikki nokk at lata lærarar fara á skeið og fáa eftirútbúgving, so teir betri eru førir fyri at handfara happing. Tryggjast má eisini, at neyðuga tímatalið verður sett av, so lærarar fáa gjørt nakað munagott í flokkunum fyri at forða happing.

Soffi Egholm fegnast um stóra áhugan fyri tiltakinum, sum bara hevur styrkt fatanaina hjá Sinnisbata av, hvussu umfatandi trupulleikin við happing í grundini er í Føroyum. Næsta stigið hjá felagnum verður at seta ein arbeiðsbólk, ið fer at arbeiða fram ímóti, at ítøkiligar mannagongdir verða settar í verk á skúlum kring alt landið.